## Bárður um fartelefonir

Fartelefonin er góð at hava, men ofta hevði verið gott at sloppið undan henni. Eg sløkki ongantíð mína telefon, og tað er kanska skeivt, men tað er næstan eitt krav, at tú skalt svara fartelefonini, tá ið fólk ringja.



## Bárður um kaffi

Eg drekki heldur te enn kaffi. Eg kundi ikki funnið upp á at skonkt mær ein kopp av kaffi og bara drukkið hann uttan víðari. Mær dámar tó kaffi saman aftur við eitt sindur av sjokulátu. Annars dámar mær betur at drekka te.

# Tað nyttar einki



**– Onkuntíð hevur tað gingið heitt fyri seg, og eg havi verið upp á kamp við onkran politikara um okkurt, men eg eri ikki ein, sum gongur runt og rópar eftir fólki. Eg royni altíð at verða diplomatiskur, tí eg haldi, at tað røkkur longur, sigur Bárður Nielsen, fráfarin landsstýrismaður við fíggjarmálum**

### Samrøða



**Eyðun Klakstein**
eydun@sosialurin.fo

Merkið veitrar við hurðina á húsunum hjá Bárði Nielsen í Vestmenna. Børnini hava sett eitt lítið flagg niður í ein urtapott í túninum, og tað sær hátíðarligt út.

– Eg fylli sama dag sum drotningin, so tey plagdu at flagga við donskum flaggi á sýslumansskrivstovuni, tá ið eg fylti, sigur Bárður Nielsen skemtandi.

Sambandsmaðurin í Vestmenna gjørdi kometkarrieru í føroyskum politikki, men áðrenn nakar varnaðist, setti hann punktum fyri politiska lívinum og fór við sjógv á baki út gjøgnum hurðina í Fíggjarmálaráðnum.

Orsøkin var stjórastarvið í Stórutjørn, og Bárður skal byggja alt upp frá ongum. Enn hevur hann ikki fingið skrivstovu, men arbeiðir við telefon og teldu heimanífrá.

Vit settu honum stevnu fyri at tosa um politikk, avbjóðingar og um at leiða við diplomati.

### Agiteraði sum 12 ára gamal

Politiska karrieran hjá Bárði Nielsen byrjaði, tá ið hann var 12 ára gamal. Tá skuldi hann verða við á einum serligum valfundi undan einum løgtingsvali.

– Tað var til løgtingsvalið í 1984, at ein lærari helt ein lítlan valfund í flokkinum. Næmingarnir skuldu tosa fyri einum ávísum flokki, og eg skuldi tosa fyri Sambandsflokkin. So eg agiteraði fyrstu ferð sum 12 ára gamal, sigur Bárður Nielsen.

Tað gingu bert 14 ár, so bjóðaði Bárður Nielsen seg av álvara fram í politikki. Hann stillaði upp til løgtingsvalið í 1998, men varð ikki valdur. Hann royndi aftur fýra ár seinni, og tað gekk betur. Hann var valdur á ting fyri Sambandsflokkin, og tá ið løgtingsval var aftur í 2004, fekk hann eitt sera gott val, kom í tingið og endaði seinni sum landsstýrismaður við fíggjarmálum.

– Eg havi altíð havt áhuga fyri politikki og samfelagsligum viðurskiftum sum heild, og tað fekk meg at stilla upp. Eg gjørdi ikki nakað serligt fyri at fáa undirtøku, men kanska var tað viðvirkandi, at eg hevði verið virkin í felags- og ítróttarlívi. Størsta takið var sjálvandi at verða valdur fyrstu ferð, eftir tað er lættari at gera vart við seg sum politikari, sigur Bárður Nielsen.

### Løgtingið spillir tíðina

Bárður Nielsen er fyri, at Føroyar verða gjørdar til eitt valdømi, men hann heldur, at eitt gott argument er ímóti hesum.

> ## Fakta
> **Navn:** Bárður á Steig Nielsen
> **Aldur:** 35 ár
> **Bústaður:** Vestmanna
> **Starv:** Stjóri fyri Stórutjørn
> **Útbúgving:** HD, fyrsta part og ávís fak innan merkonom
> **Familja:** Gifur við Rakul Nielsen (fødd Lamhauge) úr Havn. Tey eiga fýra børn

– Við einum valdømi verður tað truplari hjá fólki at verða vald fyrstu ferð. Fólk skulu á onkran hátt kenna teg, og spurningur er, hvussu nýggir politikarar kunnu vinna fram. Tað er lættari at gera kendur í einum lokalumhvørvi og verða valdur har, men vóru Føroyar eitt valdømi, so vóru treytirnar tær somu fyri øll.

Fyrrverandi landsstýrismaðurin við fíggjarmálum heldur, at nógv talar fyri, at Føroyar skulu gerast eitt valdømi.

– Alt ov nógv tíð í føroyskum politikki verður brúkt til lokalpolitikk heldur enn at loysa landspolitisk mál. Lokalpolitikkur hoyrir

Sosialurin